# Sosialurin

Nr 28 týsdagur • 11. februar 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo









## Týðandi boring við markið í mars

síða 2 & 3



## Kyndil og VB vunnu

Ítrótturin s. 17–26



## Vinnulív í Klaksvík fyrireikar seg til tunnilin

Síða 16

Magistarafelagið krevur:

# – Takið setanina av landsantikvari aftur

STARVSSETAN
*Heri á Rógvi*

Magistarafelag Føroya krevur, at setan landsstýrismansins av landsantikvari verður annulerað. Hetta sigur felagið í brævi til landsstýrismannin, Annlis Bjarkhamar.

Felagið sigur, at teirra niðurstøða er, at limur teirra, Símun V. Arge, ikki kann vera vísur í, at viðgerðin/avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt, soleiðis sum endamálið í setanarpolitikkinum er lýst. Í skrivinum til Annlis Bjarkhamar, ið var henni í hendi mánamorgunin, viðger felagið málið útfrá setanini, starvslýsingini og grundgevingini.

Samanumtikið er niðurstøðan hjá Magistarafelagnum greið: Setanin av Steffen Stummann Hansen eigur at verða annulerað.

Annlis Bjarkhamar fer at svara Magistarafelagnum aftur, og sigur seg hava onga ætlan um at broyta sína avgerð.




*Símun Arge fær nú viðhald frá Magistarafelagnum*

Síða 6











